
filmir ið koma



HELVEDES MASSAKREN

Havnar bio fer í næstum undir at sýna westernfilmin Helvedesmassakren, har Artur Grant, Maria Cuadra og Christina Galbo eru millum høvuðsleikararnar.

Tá USA hevði lýst Kalifornia fyri at vera ein amerikanskan stat, tók stríð seg upp ímillum amerikanararnar og teir múgvandi meksikanararnar, sum áttu nógva jørð, og hatrið millum báðar partarnar vaks støðugt.

Tvær familjur — tann meksikanska Campos og tann norðuramerikanska Mounters — avgjørdu at gera enda á stríðnum á tann hátt, at tann familjan, sum yvirlivdi, skuldi fáa alt valdið.

Men Campos-familjan skipaði eitt serligt herlið, sum drap ein av teimum yngru synunum í Mounters-familjuni, og tann yngsti, Johnny, varð tikin til fanga. Tað eydnaðist Johnny at flýggja, hóast hann varð hóttur við lívinum, saman við einum brotsmanni, sum hevði mist annan armin, einari fyllibyggu og einum heimsspekingi. Og tað er frá heimspekinginum, at Johnny lærir kynstrið at handfara eina skammbyrsu.

Seinni leggur Johnny ást saman við einum systkinabarni til Campos-familjuna. Hon eitur Juliet, og frammanundan er avgjørt, at hon skal giftast við einum skálki av einum sheriffi, sum styðjar seg til Campos-familjuna. Hóast Johnny hevur givið Juliet lyfti um, at hann aldri skal drepa nakran meiri, verður hann í einum føri noyddur til at drepa ein av Campos-brøðrunum í sjálvverju. Seinni kemur illstøða millum Johnny og sheriffin, og undir einum skotbardaga millum teir báðar letur sheriffurin lív. Juliet verður burturflutt av Mounters-familjuni, og tá hon vendir heimaftur, harðnar stríðið millum báðar familjurnar í ein slíkan mun, at tað er ein spurningur um at yvirliva. Tá alt er avhasað eru Johnny og Juliet tey einastu eftirlivandi.



Tað er veruleikin

Harra blaðstjóri! Gevið mær innivist fyri hesum.

Í Eyganum nr. 4 á blaðsíðu 19 stendur m. a. um okkara flagg, at tað ongar sømdir fekk, fyrr enn við heimastýrinum, sum kom í gildi 1. apríl 1948. Hetta er rætt. So stendur, at tað er heilt vist, at Havnarfólk eiga sín stóra heiður fyri, at føroyingar ikki fingu eitt flagg eftir amtmansins ynski, ið skuldi vera grønt við hvítum krossi horn úr horn. Høvdu Havnarfólk ikki mótmælt hesum so reystliga við fólkafundum og kravgongum við Jóannesi bónda sum høvuðsrøðara, er fryktandi fyri, at politiska leiðsla okkara hevði latið amtmannin fingið rætt eisini í hesum máli.

Eftir hesum at døma eigur Jóannes Patursson allan heiðurin í hesum máli. Slíkan orðavavstur sum hetta, sum stóð í næst seinasta Eygað, skal ein leita leingi eftir. Í 1931 legði Petur Mohr Dam, sáli, javnaðarfloksins vegna uppskot fram á ting, hareftir løgtingið skipaði soleiðis fyri, at vit fingu okkara egna flagg. Men hvat søgdu Jóannes bóndi og aðrir tá? Jú, málið skuldi útsetast til næsta ár. Men heldur ikki tá kom tað fyri aftur, og tað var í 1932. Soleiðis varð eisini tey næstu fýra árini. Øll hesi árini varð tað útsett, og soleiðis doyði tað burtur. Tað ber til at lesa í tingtíðindum. So í hesum máli var Jóannes bóndi týðiliga tann harðasti móstøðumaðurin. Nei, hetta reingist ikki. Tann, sum

BRØV



aftur ímóti eigur heiðurin í hesum máli, er javnaðarflokkurin við P. M. Dam, sála, á odda. So kann Eygað skriva, sum tað vil. Eg kann nevna eitt annað mál. Í 1937, ella har um leið, legði javnaðarflokkurin uppskot fram á ting um, at eingin lærari skuldi setast við føroysku skúlarnar uttan at hava prógv í føroyskum. Men hinir flokkarnir feldu tað. Her haldi eg meg so at hava prógvað sannleikan í flaggmálinum og í læraramálinum.

Javnaðarmaður

Seinkað føðingardagsheilsa

Fríggjadagin 13. juni fylti ein vælkendur klaksvíkingur, Jógvan Joensen, vanliga nevndur Jógvan lærarin ella Jógvan hjá Dala, 70 ár.

Sum eitt av nøvnunum sigur frá, hevur Jógvan verið lærari, til hann fyri trimum árum síðani fór frá vegna aldur. Hann hevur starvast sum lærari fyrst í Haldórsvík, síðani í Vági og frá 1943 í Klaksvík. Sum lærari var Jógvan nógv avhildin bæði av starvsfeløgum, næmingum og øðrum, og bar hann orð fyri at vera av bestu rokni- og matematikklærarum.

Jógvan hevur eisini rókt fleiri almenn álitisstørv. Hevur verið limur av verjuráðnum, sjúkrahústýrinum fyri Klaksvíkar sjúkrahús og í kommunustýrinum fyri Klaksvíkar kommunu í átta ár.

Jógvan hevur eisini gjørt vart við seg á vinnuliga økinum. Saman við øðrum stovnsetti Jógvan maskinverkstaðin Íðni miðskeiðis í fýrati árunum. Við síðuna av lærarastarvinum hevur Jógvan verið stjóri og bókhaldari har, og rókir hann hesi størv enn.

Ein og forfedrar hansara hevur Jógvan góðan hug til seyðahald og landbrúk, og nú hann ikki er lærari longur, fær hann tíðina at ganga við seyðahaldi í Depli, Árnafirði og á Norðoyri.

Jógvan hevur vitan sum fáur. Er prátingarsamur og dugur sera væl at siga frá og gevur sær altið stundir at práta við fólk.

Javnaðarflokkinum hevur Jógvan verið ein hollur og trúgvur stuðul. Sum longu nevnt hevur hann umboðað flokkin bæði í sjúkrahústýrinum og í kommunustýrinum í Klaksvík.

Vit takka Jógvani fyri stuðul og trúfesti. Um enn í seinna lagi fara vit at ynskja tær hjartaliga til lukku við sjeyti ára degnum við vón um mong góð ár enn.

vi

70 ár

Fríggjadagin 20. juni fyllir Oluffa Samuelsen á Vágsheygnum í Klaksvík 70 ár.

Oluffa er ættað av Viðareiði. Foreldur hennara vóru Sunneva ættað úr Tøduni á Toftum og Jóanes Heinesen, vanliga róptur Heina-Jóanes, ættaður úr Leirvík. Tey komu bæði til Viðareiðis á ungum árum, hon kom at tæna í Ónagerði og hann at rógva út. Tey giftust og búsettust á Viðareiði.

Sum ung kom Oluffa til Klaksvíkar at tæna og tænti hon m. a. hjá O. F. Joensen — Óla í Skúla. Í 1927 giftist hon við Sámal í Leirvík, sum er húsasmiður og sum í mong ár hevur arbeitt sum byggimeistari. Tey bygru sær heim á Vágsheygnum og fingu átta børn, harav fimm eru búsitandi í Klaksvík, tvey í Havn og eitt í Danmark.

Oluffa hevur ta gleði at hava øll børnini heima á sjeyti ára føðingardegnum.

Heimið hjá Oluffu og Sámal ber boð um eina dugnaliga og røkjuta kvinnu, ið hóast brekað av vanlukkutilburði fyri nøkrum árum síðani, framvegis passar mannin go heimið. Oluffa ber árini væl, er andsfrísk og fryntlig.

Tey verða mong, sum minnast teg Oluffa á hesum hátíðardegi. Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við sjeyti ára degnum og ynskja tær mong góð ár framyvir.

vinur

HB-leikarar manna helvtina av landsliðnum

Landsdysturin móti Íslandi ~~verður~~ verður í Reykjavík 23. juni

Tilsamans 16 leikarar eru útiknir at spæla á føroyska landsliðnum ímóti Íslandi í Reykjavík 23. juni. HB mannar helvtina av føroyska landsliðshópinum, sum sær soleiðis út:

Anfinn Reynheim, B36, Kári Thorsteinsson, HB, Finnur Helmsdal, HB, Palli Askham, HB, Ragnar Hansen, HB, Eirikur Rasmussen, HB, Heri Nolsøe, HB, Sverri Jacobsen, HB, Johan Johannesen, HB, Regin Árting, ÍF, Herman Midjord, ÍF, Birgir Thomsen, ÍF, Jógvan Norðbúð, KÍ, Richard Jacobsen, KÍ, Mikkjal Mikkelsen, KÍ, og Johannes Nielsen VB.

Tryggingarsambandið FØROYAR

Føroya Kriggstrygging	Tlf. 14590
Føroya Sjóvátrygging	— 14590
Føroya Brunatrygging	— 11098
Føroya Vanlukkutrygging	— 11466

Vit tryggja

Bátar, skip, vørur, hús, innbúgv, akfør o. a.

Føroyingar eiga at tryggja í landsins egnu trygging.